# Tølini tala í Klaksvík



Tað er ikki bert vinnulívið í Klaksvík sum hevur merkt positivu avleiðingarnar av Norðoyatunlinum, sum lat upp í 2006. Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi (myndin) hava tey eisini staðfest eitt økt tal av skurðviðgerðum, rannsóknum og røntgenkanningum. Skurðgerðirnar øktust frá 2006 til 2007 úr 647 upp í 790, og talið av rannsóknum úr 18.269 til 19.592 fyri innlagdar sjúklingar. Um somu tíð øktist talið av røntgenkanningum fyri ambulantar sjúklingar úr 2.611 upp í 3.393 og rannsóknir úr 46.174 til 69.462. Talið av innlegginum øktist frá 1584 og heilt upp í 1837 í 2007.

# Nýggjur dagstovnu í Kambsdali

Um tvey ár er ætlanin, at ein nýggjur dagstovnur skal standa liðugur á Kambsdali. Hetta samtykti býráðið í Fuglafirði á seinasta fundi sínum. Her varð samstundis sligið fast, at dagstovnurin kemur at kosta 24,1 mió krónur. Tilmælið um liðugtgerðina av dagstovninum er grundað á, at verandi bíðilisti og tey børnini skulu skulu flytast frá dagrøktini og yvir á dagstovnin er uppá 60 børn. Haraftrat verður mett, at tey írestandi 18 ansingarplássini verða fult nýtt, tá dagstovnurin verður tikin í nýtslu í 2010.

umbygdur í árunum 1978 til 1981, og var tá komið nakað inn á Skála, har endað varð við einum skrávegin oman í bygdarvegin.

- Ætlanin var at halda fram við hesi vegagerðini oman fyri Skála bygd og út á Strendur, men hetta kom í drag, vísti Bjarni Djurholm á.

Vegurin millum Skála og Strendur var bæði smalur og ótíðarhóskandi til vaksandi ferðsluna, og tí varð í 2000 og 2001 játtaðar íalt 2 mió krónur til ábøtur og breiðking av vegastrekkinum. Frá 2001 til 2005 er brúktar íalt 23,6 mió til henda nýggja vegin.

*»Henda farleiðin í framtíðini kann gerast ein høvuðsferðsluæðr frá norðara parti av Eysturoynni og einum møguligum tunli úr Gøtudali til ætlaða undirsjóvartunnilin millum Skálafjørðin og Havnina«*

*(Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri í mars 2006)*

### Til undirsjóvartunnilin

At ein yvirhøvur fór undir hesa breiðkingina, kom av at henda farleiðin í framtíðini kann gerast ein høvuðsferðsluæðr frá norðara parti av Eysturoynni og einum møguligum tunli úr Gøtudali til ætlaða undirsjóvartunnilin millum Skálafjørðin og Havnina.

Samlaða verkætlanin fevnir um liðugtgerð av vegnum millum Skála og Strendur, og síðani 2400 metrar av nýggjum vegi í Skálafirði.

Hesin skal gerast frá dagførda vegnum sunnanfyri bygdina og síðani omanfyri bygdina, við eini brúgv um Fjarðará og eini íbinding í landsvegin umleið 150 metrar norðanfyri verandi íbinding. Vegurin verður eftir ætlanini 7 metrar breiður.

- Dentur er lagdur á at hava so fáar íbindingar sum gjørligt, fyri at tryggja framkomuleikan og ferðslutrygdina. Íbindingar verða tó við bygdina í Skálafirði, á Skála og á Strondum, segði Bjarni Djurholm í uppskotinum. Víst varð eisini á, at gamli landsvegurin á teininum skal verða ogn hjá ávikavist Runavíkar og Sjóvar kommunum.

Uppskotið er gjørt í samstarvi við Landsverk, og kundi vegurin í Skálafirði verða liðugur í 2012 ella 2013.

Málið varð síðani til viðgerð í løgtinginum og í vinnunevndini, har tað í løgtinginum varð einmælt samtykt við 3. viðgerð 6. apríl 2006.

Samstundis bíða fólk í Skálafirði tolin eftir ein loysn á hesum átroðkandi máli!



*Landsverk hevur gjørt eitt uppskot um, hvussu vegaføringin skal verða á vestara armi á Skálafjørðinum. Vegurin um bygdina í Skálafirði fer eftir ætlanini at taka tvey ár at gera og fer helst at kosta einar 40 mió krónur. Spurningurin er bara, nær arbeiðið byrjar*

*Mynd: landsverk.fo*

# Í 60 ára føðingardag hjá Ísrael

**Í morgin fara leiðarar úr hvítusunnusamkomum í Føroyum og hinum Norðurlondunum til Ísraels at vitja. Ísraelska ferðamálaráðið bjóðar og rindar teimum ferðina**

SAMSTARV
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Ísrael/Føroyar:** Ferðin til Ísraels er komin í lag, nú 60 ár eru liðin síðani staturin Ísrael varð lýstur.

Hetta hendi júst í dag - 14. mai í 1948 - og í hesum sambandi fara samkomuleiðarar til Ísraels at vitja í nakrar dagar.

Úr Føroyum fara Tummas Jacobsen úr samkomuni Filadelfia í Havn og Dánjal á Dul Jacobsen úr Evangeliihúsinum, men sum á ferðini er við sum tíðindafólk hjá útvarpsrásini Lindini.

- Eg gleði meg nógv til ferðina, serliga hetta at kunna hitta nakrar av kristnu jødunum. Teir eru ikki so nógvir, men eg havi kortini skilt, at talið á teimum er alsamt vaksandi.

- Og hetta gleðast vit sjálvandi um, sigur Tummas Jacobsen, fyristøðumaður í Filadelfia við Sosialin.

Ferðalagið fer úr Danmark í morgin og verður aftur mikudagin í komandi viku.

### Veking millum jødar

Tummas Jacobsen hevur eina ferð áður verið í Ísrael - tí Heilaga Landinum, sum summi nevna tað.

Hetta var í 1999, tá hann var luttakari á einari bønarráðstevnu. Júst um hetta mundið brast ófriður á, og tí sluppu tey ikki at vitja so nógv av kendu bíbilsku støðunum, sum ætlanin upprunaliga var.

Hesaferð verður kortini øðrvísi: Ísraelska ferðamálaráðið hevur lagt eina fjølbroytta og spennandi skrá fyri teir norðurlendsku samkomuleiðararnar, har teir koma at vitja bæði í Nasareth, Galilea-sjógvin, Deyðahavið og tey mongu søguligu støðini í Jerusalem bara fyri at nevna brot úr skránni.

Seinasta dagin á ferðini fáa Tummas, Dánjal og hini í fylginum eina serstaka uppliving: Tá sleppa teir at hitta kristnar jødar.

Henda dagin skipa hvítusunnusamkomurnar í økinum fyri ymiskum tiltøkum, har báðir partar kunnu hittast, fáa góða tíð at tosa saman og soleiðis kunnu læra hvønn annan at kenna. Ynskið hjá gestunum er í øllum førum at fáa góð viðurskifti og góð sambond við tey kristnu í Ísrael.

- Vit hava sjálvir ynskt at koma á tal við hesar kristnu jødarnar og samkomuleiðarar teirra. Og henda partin av vitjanini gleði eg meg ótrúliga nógv til.

- Eg vóni, at vit fáa eitt gott og inniligt samband við tey, - eitt samband ið vit ynskja at halda viðlíka, eisini í framtíðini, slær Tummas Jacobsen fast.

**Meiri verður at frætta um ferðina, tá Dánjal á Dul Jacobsen fer at greiða frá ferðini í Lindini.**



*- Eg gleði meg nógv at vitja Jerusalem og at hitta teir kristnu jødarnar, sigur Tummas Jacobsen (innsetta myndin)*